## 25 ár í USA



Í hesum árinum verða 25 ár liðin síðan Honda stovnaði sína egnu verksmiðju í USA. Í dag eru teir fjórðstørsti bilframleiðari í USA og heimsins størsti innan motorsúkklur. Fyrsti Honda Accord koyrdi av samlibandinum í Ohio 1. november 1980

*Kelda: Motor Magasinet*

## Størri Yaris





Á internetinum eru nógvar myndir av nýggja Toyota Yaris, sum væntandi verður frumsýndur á Frankfurt Motorshow seinni í ár. Bilurin á myndunum eitur Vitz, ið er japanska navnið hjá Yaris

*Kelda: Motor Magasinet*

## Subaru boxerdiesel



Subaru hava higartil ikki havt nakran dieselmotor í síni skrá, men frá síðst í 2007 ella fyrst í 2008 koma teir við tveimum boxer-dieselmotorum upp á ávikavist 2,0 og 2,2 litur, sum verða gjørdir við hjálp frá Porsche

*Kelda: Motor Magasinet*

# Super Dekk við betri tænastu



*Fríðrikur Bláhamar við ein Mercedes-Benz Sprinter servicebilinum. Bilurin er sergjørdur til allar tær arbeiðsuppgávur sum ein nútímans dekkverkstaður kann bjóða seg fram til*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Dekksølan Sp/f Super Dekk við Hoyvíksvegin, sum m.a umboðar amerikansku Goodyear-dekkini, hækkar nú tænastustøði við einum væl útgjørdum servicebili til at "rykkja út" í høvuðsstaðsøkinum**

SERVICEBILUR

At selja dekk til øll sløg av akførum krevur góða tænastu, ásannar stjórin á dekksøluni Super Dekk við Hoyvíksvegin í Havn, Fríðrikur Bláhamar.

Hann hevur tí saman við starvsfólkum á fyritøkuni umbygt ein Mercedes-Benz Sprinter til servicebil. Bilurin er sergjørdur til allar tær arbeiðsuppgávur, sum ein nútímans dekk-verkstaður eigur at kunna bjóða seg fram til.

Tað eru ikki øll akfør, sum kunnu koma á verkstaðið, tá tey eru punkteraði, sum t.d. trukkar, gravimaskinur og onnur arbeiðstól.

Servicebilurin er eisini til aðrar uppgávur í høvuðsstaðarøkinum, sum t.d. um ein bilur punkterar, og bilførarin av eini ella aðrari orsøk ikki hevur møguleika at skifta hjólið.

Tá er neyðugt við einum væl útgjørdum servicebili, sum hevur øll tey neyðugu amboðini og kompressara við nóg mikið av lufttrýsti, sigur Fríðrikur Bláhamar.



# Projekt 511 - konseptbilur frá VW

**Volkswagen hava nú so nógv ymisk modell koyrandi, at ein skuldi ikki trú at pláss var fyri meira, men arbeitt verður í løtuni við Projekt 511, sum í stødd verður millum VW Passat og tann størra VW Phaeton**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Volkswagen arbeiða í løtuni við eini verkætlan, sum snýr eg um ein luksusbil, sum í stødd verður ímillum VW Passat og tann størra VW Phaeton. Talan er um Projekt 511, sum er navnið á konseptbilinum.

Eftir ætlan verður Projekt 511 bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform, sum eisini skal nýtast til ein møguligan avloysara fyri VW Phaeton.

Projekt 511 verður drivin av bakhjólunum og skal eftir ætlan kappast við aðrar týskar bilar sum t.d. Mercedes-Benz E, BMW 5 og Audi A6, sum er í somu familju.



*Projekt 511 verður ein luksusbilur, sum í stødd verður ímillum VW Passat og tann størra VW Phaeton*



*Projekt 511 fær smart design og líkist einum coupé aftan*